# Runavíkin vinnur hjá teimum stóru



*Eysturoyingur og Heiðabáturin hava vunnið allar róðrarnar trygt í ár, men á Fjarðastevnu fekk Heiðabáturin leingi kapping frá Árnfirðingi, sum hevur tikið seg sera nógv fram síðstu róðrarnar.*

*Mynd: www.rogving.fo*

**8-mannafari og 10-mannafari úr Runavík eru als ikki til at steðga í ár, tí bæði Heiðabáturin og Eysturoyingur hava vunnið allar sínar fimm róðrar í hesum kappingarárinum uttan at nøkur av hinum bátsmanningunum veruliga hevur hótt teir**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tað er eingin ivi um, at Runavíkin er sterkast í Føroyum, tá talan er um teir størstu bátarnar í okkara tjóðarítrótt, kappróðrinum. Undan Fjarðastevnuni høvdu bæði Heiðabáturin og Eysturoyingur vunnið allar sínar róðrar, og sum kappingarárið hevur lagað seg var ikki væntandi, at nakar fór at megna at steðga teimum á Fjarðastevnuni.

Soleiðis bleiv heldur ikki hesaferð. Bæði Heiðabáturin og Eysturoyingur vunnu sínar róðrar sannførandi, og einki er at ivast í, at málið hjá bæði Heiðabátinum og Eysturoyingi er at vinna allar sínar róðrar í hesum kappingarárinum.

### Framtíðin hjá flaggskipinum tryggjað

Síðani Eysturoyingur bleiv bygdur fyri nøkrum árum síðani, hevur hann verið mest sum fastur fúsur í oddinum hjá 10-mannaførinum. Fleiri av árunum hevur hann vunnið meistaraheitið, meðan hann hini árini hevur verið væl við í FM-kappingini.

Í so máta hevur hetta kappingarárið ikki verið nakað undantak. Tað, sum tó er broytt í hesum kappingarárinum, er, at kappróðrarfelagið NSÍ hevur fingið eitt 8-mannafar, sum er blivið líka dominerandi í sínum bátaflokki, sum Eysturoyingur hevur verið tað hjá 10-mannaførunum.

Tað hevur ikki verið vanligt hjá kappróðrarfelagnum NSÍ at hava tvær so góðar manningar hjá bæði 8-mannaførunum og 10-mannaførunum, men hetta vísir, at arbeiða hjá felagnum við teimum stóru bátunum er tað rætta. Hetta er harafturat ein staðfesting av, at framtíðin hjá Eysturoyingi sær bjørt út. Tað er nevniliga neyvan nakar ivi um, at tá onkur av eldru monnunum umborð á Eysturoyingi gevast at rógva, so stendur eitt nýtt ættarlið av ungum og evnaríkum rógvarum klárir í bakgrundini at taka yvir umborð á flaggskipinum hjá runavíkingum.

### Heiðabáturin fekk kapping

Í undanfarnu fýra róðrunum kann man lættliga siga, at Heiðabáturin og Eysturoyingur ikki hava fingið nakra serliga kapping, og hjá Eysturoyingi var tað sama galdandi á Fjarðastevnuni. Teir stutt og greitt hølvaðu Vestmenning av, og tískil var heldur eingin ivi hjá teimum hesu ferð.

Hjá Heiðabátinum gjørdist tó heldur meir spennandi,

## FM-kappróður

| 5-mannafør, dreingir | Stig íalt | Fjarðastevna |
|---|---|---|
| 1 Havfrúgvin | 31 | 5 |
| 2 Sílið | 27 | 7 |
| 3 Teistin | 16 | 0 |
| 4 Tjaldrið | 13 | 3 |
| 5 Jallurin | 9 | 4 |
| 6 Junkarin | 6 | 1 |
| 7 Jomfrúgvin | 3 | 0 |
| 8 Blikur | 3 | 0 |
| 9 Drekin | 2 | 2 |
| **6-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 Jarnbardur | 35 | 7 |
| 2 Kollfirðingur | 23 | 4 |
| 3 Lómur | 14 | 5 |
| 4 Smyril | 8 | 0 |
| 5 Hvessingur | 2 | 0 |
| **5-mannafør, gentur** | | |
| 1 Hvassi | 33 | 7 |
| 2 Drekin | 24 | 5 |
| 3 Tambar | 23 | 4 |
| 4 Ørnin | 14 | 2 |
| 5 Blikur | 11 | 3 |
| 6 Teistin | 5 | 1 |
| **5-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 Sílið | 30 | 7 |
| 2 Fípan Fagra | 21 | 5 |
| 3 Ørnin | 21 | 4 |
| 4 Frúgvin | 20 | 3 |
| 5 Ritan | 9 | 2 |
| 6 Teistin | 8 | 1 |
| 7 Jallurin | 1 | 0 |
| **6-mannafør, menn** | | |
| 1 Sundabáturin | 33 | 7 |
| 2 Tvørabáturin | 25 | 5 |
| 3 Strálan | 22 | 4 |
| 4 Jarnbardur | 14 | 3 |
| 5 Lómur | 6 | 1 |
| 6 Sølmundur | 5 | 0 |
| 7 Riddarin | 3 | 0 |
| 8 Rádni | 2 | 2 |
| **8-mannafør** | | |
| 1 Heiðabáturin | 35 | 7 |
| 2 Argjabáturin | 24 | 4 |
| 3 Ørvur | 18 | 3 |
| 4 Árnfirðingur | 16 | 5 |
| 5 Knørrur | 12 | 2 |
| **10-mannafør** | | |
| 1 Eysturoyingur | 35 | 7 |
| 2 Vestmenningur | 25 | 5 |
| 3 Havnarbáturin | 12 | 0 |

## Kappróðrarúrslit frá Fjarðastevnuni

**5-mannafør dreingir:**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 05:32.18 |
| 2 | Havfrúgvin | 05:37.03 |
| 3 | Jallurin | 05:40.16 |
| 4 | Tjaldrið | 05:44.00 |
| 5 | Drekin | 05:45.04 |
| 6 | Junkarin | 05:46.21 |
| 7 | Teistin | 05:49.07 |
| 8 | Blikur | 06:06.19 |
| 9 | Fípan Fagra | 07:15.15 |

**6-mannafør kvinnur:**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 05:38.00 |
| 2 | Lómur | 05:57.17 |
| 3 | Kollfirðingur | 06:11.04 |

**5-mannafør gentur:**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Hvassi | 05:52.14 |
| 2 | Drekin | 05:53.21 |
| 3 | Tambar | 05:58.12 |
| 4 | Blikur | 06:08.22 |
| 5 | Ørnin | 06:17.23 |
| 6 | Teistin | 06:22.19 |

**5-mannafør kvinnur:**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 05:32.02 |
| 2 | Fípan Fagra | 05:34.24 |
| 3 | Ørnin | 05:37.14 |
| 4 | Frúgvin | 05:37.20 |
| 5 | Ritan | 05:37.21 |
| 6 | Teistin | 05:47.23 |
| 7 | Erla Kongsdóttir | 05:51.03 |
| 8 | Jallurin | 05:59.07 |
| 9 | Blikur | 06:10.05 |

**6-mannafør menn:**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Strálan | 06:13.17 |
| 2 | Sundabáturin | 07:59.20 |
| 3 | Tvørabáturin | 08:05.12 |
| 4 | Jarnbardur | 08:18.15 |
| 5 | Rádni | 08:22.22 |
| 6 | Lómur | 08:26.08 |
| 7 | Riddarin | 08:41.18 |
| 8 | Kollfirðingur | 09:25.07 |

**8-mannaførini:**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Heiðabáturin | 07:25.11 |
| 2 | Árnfirðingur | 07:25.21 |
| 3 | Argjabáturin | 07:32.13 |
| 4 | Ørvur | 07:34.19 |
| 5 | Knørrur | 07:46.06 |

**10-mannaførini:**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 09:43.13 |
| 2 | Vestmenningur | 09:58.22 |